ongin uppreistur, ongin skoðan inn í framtíðina. Byrjandi moydnaroykur og turrur deymur av status quo smellir í næsagluggarnar.

Hetta stendur í skærari andsøgn til myndirnar á skíggjanum hjá teimum, sum eru á mínum aldri. Sterku haldini og orðini á Vaglinum hendan dagin og úti á Skansanum, á Doktaragrund og úti í Læraraskúlahøllini, harið alt slag av sosialistum hittust, reyða kórið sang og stríðsfúsir ungdómar slerdu eitt slag fyri eini solidariskari framtíð. Nú er alt individualiserað. Amerikaniserað. Globaliserað. Øll hava nógmikið í sær sjálvum. Vælferðarsamfelagið doyvir. Vaksnir menn sleingjast í sofum, eta poppkorn og zappa seg ígjøgnum tíggjutals sjónvarpskanalir. Drekka skálir fyri Morinho og Abramovich. Illneitast um okkurt slatriblað, sum rør framundir, at Ferguson er í holt við at selja van Nistelroy og um nakað man vera í tíðindunum um allar bordelvitjaninar hjá Wayne Rooney. Er vælferðarsamfelagið ávegis at sigra seg sjálvt í hel. Í fer við at gerast eitt tómt fíggjarligt hylki – við ongum substansi? Ongari kós? Ongum hugsjónum ella visiónum, sum kunna flyta menniskja inn í eina spennandi og innihaldsríka framtíð?

Aftur til tíðina áðrenn Berlinmúruin brast í svørðin. Hetta var eisini tíðin táið diktatorarnir í Moskvu, Peking og Pyongyang sendu kremið av sínum hernaðarliga ísinkrammið út í gøturnar. Hesar øgiligu paradurnar. Potensforleingjarar hjá despotiskum regimum, bæði inneftir og úteftir. Hetta er næstan søga. Tað, sum teir kallaðu kommunismu eystanfyri, fall við einum braki. Teir tóku valdið frá fólkinum og búraðu tað inni handan múrarnar í Kreml. Hildu seg kunna steðga dialektikkini, natúrligum spenningum og frumbornu elastikkini, í einum gøllhaldi av hermegi, fregnartænastu, løgreglu, spionasju og slatrarum. Fundamentið krakeleraði og heimurin er kanska meira samanrunnin nú enn nakrantíð í nýggjari tíð. Og sjálvandi hevur hetta broytt hugburðin og menniskja. Eisini í Føroyum.

Men harfyri eiga vit ikki at vera minni á varðhaldi í tíðini sum kemur. Fakfeløgini hava eina standandi uppgávu, sum umframt at selja arbeiðsmegina so dýrt sum møguligt, eisini er at kjálka seg so tætt uppat politiska valdinum, soleiðis at javnvágin ikki skeivglast í samfelagnum, berjast fyri at samfelagsins búskaparliga tilfeingið verður býtt so javnt sum møguligt.

Og í mun til onnur lond, sjálvstøðug lond, væl at merkja, so hevur hetta danska hjálandið fleiri politiskar rásir, ið skula eygleiðast, ávirkast og røkjast.

Tað var ikki av tilvild, at Karl Marx skipaði sína hugmyndafrøði og byltingarástøðina á arbeiðarastættina. Hon var hin einasta, ið kundi broyta nakað sum helst. Hon hevði onki at missa. Hann, ið onki annað eigur at selja, uttan sína arbeiðsmegi, eigur ikki at ræðast leiklutin, sum byltingaramboð fram ímóti eini broyttari framtíð. Og júst í hesum spurninginum hevur føroyska arbeiðararørslan havt eina merkiliga defensiva rollu í tí tjóðskaparligu framsøkn, sum hevur verið roynd hesi seinastu árini. Tað er júst haðani megin skuldi verið komin og tað er ein fatal misskiljing, at løntakararnir í Føroyum liva av donskum ríkisveitingum. Teir liva snøgt sagt bara av tí sum teir til eina og hvørja tíð megna at selja seg sjálvar fyri á frælsa arbeiðsmarknaðinum. So einfaldur er veruleikin. Og tað vera ikki matematisk og akademisk prosjektir sum loysa gordiska knútin millum Føroyar og Danmark. Tann megin má koma úr hjartanum á fjøldini – og serliga tykkum sum eiga dagin í dag. 1. mai.

Í morgin fer arbeiðarin aftur til samráðingarborðið. Tilvitað hevur politiska skipanin lagt sínar samráðingar aftur um privata arbeiðsmarknaðin.



Vitandi um, at breyðpolitikkurin ikki tolir trýstið á almenna arbeiðsmarknaðinum. Líkamikið hvørið situr við radiatorarnar í Tinganesi, so boygna ryggjageislarnir táið útlitini fyri atkvøðumissi gerast sjónsk. Tí skal arbeiðarin vera rambukkur í einum ódámligum leiki. Harið leisturin verður lagdur fyri einum lønarvøkstri, sum í prosentstigi pr. definitión verður fluttur yvir á almennu lønirnar, ið frammanundan eru spolaðar undan arbeiðaralønunum. Gjógvin veksur ikki bara við hesum órætti. Javnaðarsamgongan, ið nú situr, hevur eftir trýsti frá Óla Breckmann, sambært Charles Adams manifestinum, lógarásett teimum vælbjargaðu skattalættar soleingi hendan konservativa og asosiala koalitiónin situr. Føroyar skeivglast. Sosialt. Javnaðarmenninir lóggeva solidaritetin út úr samfelagnum. Og ímeðan munurin ímillum vanliga løntakaran og tey vælbjargaðu, politiskt verður vaksin, sita løgmaður og hansara akademisku sveinar og fabulera um hvussu føroyska samfelagið fer at síggja út um 10 ár. Tit sum verða takserað tíma fyri tíma, fyri neyðsynjarløn, dragna í stórum, í mun til ein vaksandi skara av almennum pottaplantum, sum eru tryggjaðar í høvd og í reyv, líkamikið um tær fáa nakað á skaftið ella ikki. Eitt slaraffenland, sum politiska skipanin ikki torir at røra við eini eldtong. Ongin inn- & útstempling. Onki eftirlit. Ongin agi. Tíðarleysar kaffipausir. 4-5 tíma effektivur arbeiðsdagur. Ókeypis skeið, ókeypis telda, ókeypis alnót, ókeypis ferðir uttanlands. Ein tryggjaður aldurdómur á luksusklassa, í mun til tykkara, sum bera hetta samfelagið á tykkara treystu herðum. Almenni sektorurin er farin at líkjast yvirísaðu gálgunum á Tórkeli Mána, áðrenn teir vórðu skornir niður í eini orkan yviri á Flamingjagrunni.

Og meðan frakkavelini dusa sær í loftrúminum millum Føroyar og umheimin, fæst samgongan við at bjarga teimum, ið riðu samfelagnum sum marran ígjøgnum kommanditfeløg, partsreiðaríir og aðrar spekulatiónir. Avskrivar sambært lóg hundraðtals milliónum av spekulativari skuld. Leggur avgjøld á vanligar brúksvørur. Skerjir mentanina. Tosar um ov høgar oljuprísir hjá flotanum og ikki um pensionistarnar sum hava skrúva sjuntin niður á oljufýringunum, tí ráðini eru ikki til varma longur. Letur russiskar klondeikarar, føroyskar strámenn og primitivt trælahald kappast við føroyska arbeiðsmegi og vinnu. Letur rasistiskar undirtónar stjórna innflytarapolitikkinum. Knúsar lokalsamfelagið í Vági av berari hugmóð. Letur spekulatiónina í ogn Føroya fólks halda fram, soleiðis at uppkeypið av summarresidensum við sólsveipta Miðjarðarhavið kann halda fram. Soleiðis kundi verið hildið á í tað óendiliga.

Ímeðan 2015 er vorðið eitt magiskt ár hjá sólkonginum av Tvøroyri, galloperar undirskotið á landsins fíggjarlóg. Sigst, at framrokningarnar siga einar 400-500 milliónir í ár. Kanska 700 næsta ár. Ímeðan er føroyskt vinnulív við at detta sundur av vantandi vinnupolitikki. Ongin trýr uppá nakað soleingi ein evnaleysur ministari situr og sólar sær í sær sjálvum, og fæst við alt annað enn tað, sum ein vinnumálaráðharri átti at tikið sær fyri. Ei undur í, at góðar 11 milliardir liggja uppspardar og steindeyðar í peningastovnunum og at einasti váðafúsi kapitalurin endaði í týsku spekulatiónsfyritøkuni Phoenix. Av berari vinnupolitiskari armóð. Og tað skal ikki undra nakran, um vanligi føroyingurin skal vera rambukkur táið hendan samgongan hevur karvað botnin undan búskapinum aftur. Tað má enda galið tá ið ongin skal stjórna nøkrum, skútan er løgd fyri íla og brotini bara herðast, sum bólta inn yvir skanndekkið. Upptakið verður ikki tespiligt.

Og nú gjørdi feigdin um seg í tjóðskaparspurninginm eisini. Sjálvstýrismálið er loyst sigur løgmaður. Hann má hava mist orienteringssansin í øllum pípuroykinum, táið hann hevur lagt seg í støvið fyri ríkiskallinum Anders Fogh Rasmussen. Saman við Fólkaflokkinum sementerar hann nú eitt afturstig í mun til heimastýrislógina í ríkislógartilmælinum um yvirtøkulóg og í lógini um uttanríkispolitiskar heimildir. Pantsetur frælsið í donskum varmapútum. Ein nationalpolitisk skandala, sum fer at fáa víðfevndar fylgjur fyri tjóðina og hennara status í heimssamfelagnum. Ikki undarligt, at fyrrverandi rektarin á universitetinum kendi seg kallaða, at geva danska ríkinum, eindarstatinum, symbolikkin til hesa neyðarsligu og avmaktaðu sátt. Og at teir báðir megineksponentarnir fyri føroyskt mentanarlív, ríðandi so sjelaglaðir á Rosinante uppi í Gundadali, business-advokaturin og Fossbankastjórin, valdu at hýsa hesum fantastiska listaverkinum á tjóðlistasavni okkara. Hetta er vorðin ein tjóð av avmaktaðum zombiarum. Hevði oddvitin á Háskóla Íslands alment lanserað ein slíkan býttleika og so lítið av meðviti og snúsfornuft, áðrenn republikkin var grundsett, høvdu íslendingar sett falløksini upp í Reykjavík, og kappað høvdið av honum fyri landasvik. Við ella uttan ketsjup - í einum hjørni. Hava tær ikki spælt fallit frammanundan, so spældu tær akademisku Føroyar so himinrópandi fallitt hin 25. apríl í ár. Dagurin, táið savningarmerkið hjá okkum øllum skuldi hátíðarhaldast.

The times they are a´changing. Frá framamonnum - til sosialdemokratiskar pamparar, sum stórtrívast í spekulativa renslinum hjá Fólkaflokkinum, og frá teimum akademisku Føroyum, sum designaðu og seymaðu okkum Merkið - til discountakademiina, sum ætlaði at forkoma okkum flagginum fyri lítlari viku síðani.

Komið er til endans. Harmist um at tað ikki eydnaðist mær at taka av danska grundlógardagin í Føroyum og gera arbeiðaradagin til frídag hjá føroyskum skúlaungdómi ístaðin. Men dagurin er fyrst og fremst tykkara. Góða eydnu teir komandi dagarnar, táið prísur skal setast á tykkara væddamegi, skil og heilamegi. Tit eru tærið og skorðan undir vælferðarsamfelagnum, sum tær politisku Føroyar eru farnar í holt við at liða sundur og avskepla. Góðan byr. Og takk eiga tit ið lýddu á hesa løtuna.